# Hava ikki ráð at vera tey ungu og útbúnu fyri uttan

**FLOKSTING - Við áhugaverdum vitanarstørvum, granskingar- og undirvísingarstørvum stinga nýggjar vinnur seg upp, segði Óluva Klettskarð á flokstingi hjá Tjóðveldi**



Vilmund Jacobsen

Óluva Klettskarð, sum sjálv er uppvaskin í Haraldsundi, nýtti høvi á flokstinginum leygardagin at ynskja Tjóðveldi og Føroya fólki tillukku við uppskotinum at skipa Føroyar sum sjálvstøðuga tjóð.

Í røðu síni legði hon dent á, føroyingar liva av tí, vit skapa.

- Lat tað vera púra greitt, at skulu vit hava meir at liva av, mugu vit eisini skapa meir. At skapa meiri er ikki altíð tað sama sum at økja mongdina, fiska størri nøgdir ella at framleiða meiri. At skapa meiri kann eisini vera tað sama sum at virðisøkja.

Óluva vísti á, at tað at hava meir um hendi eisini kann gerast við at raka alt omanav og harvið minka um tænastustøðið. Eisini ber til at skatta meiri, so peningur fæst tann vegin.

- Men, tað ber eisini til innætta og skipa samfelagið soleiðis, at meiri fæst burtur úr. Fleiri dugnaligar hendur og heilar. Henda loysnin er so nógv tann virðiligasta og hóskiligasta fyri okkum. Tí, her er rættiliga fitt at tríva í.

Hon vísti á, at við tí ovurstóra útflutningi av fólki hava vit eina stóra avbjóðing. Vit hava ikki ráð til at vera tey ungu og vælútbúnu fyri uttan, og tá tey festa røtur í bestu árum, verður hetta í útlandinum, meðan tey eru undir útbúgving.

- Kanningar vísa, at avgerandi fyri tey ungu - umfram trivnað - er at fáa dygdargott arbeiði eftir lokna útbúgving. Tískil eiga vit at menna útbúgvingar- og granskingarverkið, og í staðin fyri at senda fólk av landinum at taka grundútbúgvingar, skulu vit heldur skipa fyri flestu neyðugu og eftirspurdu grundútbúgvingum hjá okkum sjálvum.

Hon segði, at við dyggum heimligum grundarstøði liggur alheimurin opin fyri teimum, ið eru undir út-

# Blokkurin 5% av føroysku fram

Á flokstingi, sum Tjóðveldi helt í Haraldssundi í vikuskiftinum, samtykti fundarfólkið hesa yivirlýsing:

"Sitandi heimastýrisstjórn er syndrað. Eftir sløk 8 ár undir at kalla somu leiðslu valdar eyðsýndur ruðuleiki í politisku skipanini og samfelagnum. Samfelagsins lunnindir liggja í órøkt, og javnvágirnar í búskapinum eru í ringum standi. Stagnatión er dagsins veruleiki – tað er ikki tómgongd men afturgongd. Í grundini er eingin politisk stjórnan, menn og kvinnur káva bara í blindum og gøllhalda um valdið.

Upp ímóti hesum stendur loysingarrørslan, sjálvræði og ábyrgd, sum parlamentariskt er umboðað í Tjóðveldinum. Frælsi og búskaparlig endurreisn hanga treytaleyst saman. Tí er okkara boð, nú tað stundar til politiskt valdsskifti í landinum:

* Greið ætlan verður løgd fyri, hvussu vit skipa føroyska statin í komandi valskeiði. Samsvarandi verður bindandi ætlan gjørd um, hvussu føroyski búskapurin verður frígjørdur fyri ríkisveitingina.

* Samríkjamenn gera blokkin til lívsæðr í Føroyum, hóast hann bert er 5% av samlaðu føroysku framleiðsluni. Veruleikin er, at blokkurin umframt mentalu doyvingina og negativu multiplikatoreffektina fremur fyri 615 milliónir krónur av politiskum leti í Føroyum. Persónligt frælsi, politiskt frælsi og tjóðskaparligt frælsi eru treytin fyri einum veruligum vælferðarsamfelag.

* Í hesum døgum sita politiskir leikarar og snikka til eina føroyska stjórnarskrá. Upprunaliga skuldi hon leggjast sum grund undir føroyska statin. Danskir myndugleikar og onnur høvdu sátt iva um rættindamørkini í uppskotinum, sum allir flokkar á tingi tóku undir við. Tjóðveldi tekur ikki undir við aðrari stjórnarskrá enn henni, sum gevur okkum møguleikan at fremja óskert politiskt tjóðarfrælsi.

* Eitt sterkt og sunt vinnulív, ið raðfestir íverksetan, er grundtreytin fyri einum framkomnum samfelag. Ein vaksandi inntøkugerð er alfa og omega og hartil møgulig. Fá lond eiga størri óbrúktar møguleikar enn Føroyar. Tjóðveldi eigur higartil einasta uppskotið um, hvussu fiskivinnupolitikkurin skal rekast framyvir. Settur í verk, fer hann at vaksa mundandi um inntøkur landsins, og í einfaldum orðum stendur hann enn á stovnsrøktarhugsjónini: Fiskastovnarnir muga verjast og umsitast sum varandi grundarlag undir føroyska samfelagnum. Hetta er tað sama sum lívfrøðiliga og búskaparliga burðardygg veiða.

* Neyvar ásetingar og politiskur agi skulu frameftir fremja ein burðardyggan orku-og umhvørvispolitikk og nattúruvernd. Vit eiga at ganga í fremstu røð í heiminum, tá tað ræður um at fáa hesi viðurskifti í rættlag. Umframt at hetta gagnar Jørðini, fer hetta svitaleyst at gagna føroyska búskapinum, serliga tá veiðiflotin verður rationaliseraður í sterkar burðardyggar eindir soleiðis, at innflutningur av dýrum fossilum brennievni kann minkast munandi í mun til veiðina.

* Dýrasta tilfeingi í landinum er fólkið. Búskaparliga endurreisnin stendur og fellur við unga fólkinum og tess møguleikum at útbúgva seg. Tjóðveldi stuðlar av heilum huga, at flest møguligir møguleikar verða fyri lestri á skúlum og Fróðskaparsetri. Farast skal skjótast gjørligt undir gerð av næmingaíbúðum í lestrarbýunum, sum kunnu skapa lestrarumhvørvi og hýsa skjótt vaksandi talinum av lesandi fólki.

* Tørvur er á dyggari tjóðarbygging í Føroyum. Síðan fullveldissamgongan fall, og borgarliga sambandssamgongan tók ræði yvir heimastýrinum, er stígur og hóttafall komið á grundstovnar og mentanarberar landsins. Teir almennu. Politiska skipanin skal frameftir raðfesta mentanarspurningar um alt landið í nógv størri álvara og gera tað munandi meira fíggjarliga rúmsátt hjá mentanararbeiðarum landsins. Eitt nú rithøvundum og listafólki annars. Týdningurin hesi fólkini hava fyri tjóðarinnar sál og mál kann ikki yvirmetast. Og arbeiðið móðurmálinum at frama eigur alt fyri eitt at raðfestast, og átøk at fremja týðing av skaldskapi og at menna málið í tøkniliga heiminum eiga at verða sjálvsagdur partur av mentanarpolitikki landsins.

* Umframt yvirskipaðu strategisku mál floksins eiga hesi bráðfeingis mál at vera loyst í dagsins politiska ruðuleika: Upprudding í almennu fyrisitingini. Vit krevja eina óspilta fyrisiting, har brot á rættartrygdina fáa avleiðingar beinanvegin, og har bygnaðurin verður endurskoðaður frá grundini. Politiska útlutingin av tilfeingi og vinnurættindum verður steðgað. Allar vinnur skulu hava javnar kappingartreytir og fiskirættindi bjóðast út. Fíggingar- og rentukostnaður skal minkast fyri vinnu og húsarhald. Realkredittur, Húsalánsgrunnur, løggáva viðvíkjandi peningastovnunum og onnur átøk skulu fremjast til tess at minka um dýra kostnaðarstøðið. Skatta- og